Krabbagágga í egnum landi:

# Krabbagágga í egnum landi

Far ikki yvir um ánna eftir vatni. Rým ikki úr tínum egna landi, nú tað er vakrast mitt um summarið. Tað, ið útlendskir gestir hungra eftir, er jú títt!

Nakað soleiðis ljóða áheitanirnar frá Ferðaráð og føroyskum ferðaskrivstovum, sum í seinastuni eru farin at venda eyguni inneftir ímóti okkum beindovnu føroyingum, ið kanska bert skulu freistast eitt sindur við vøkrum orðum og grønum góðveðursmyndum fyri at venda sól og strond bakið og gerast góðir kundar hjá føroyskari ferðavinnu.

Okey meðni siga vit og senda eina krabbagággu avstað her frá blaðhúsinum á Argjum – út í nærmastu ánna eftir vatni, nú landið er vakrast mitt um summarið. Út eftir tí, sum er okkara. Tí, sum útlendskir gestir hungra eftir. Út at ferðast í egnum landi við ryggsekki, soviposa og klønum pengapungi.

Á leiðini fer krabbagággan at skriva heim um alt, sum er vert at skriva heim um.



## Krabbagággan

Á síni ferð skal krabbagággan hjá Sosialinum liva fyri í mesta lagi 300 krónur um dagin. Fyri hesa upphædd skal hon gerast mett hvønn dag og helst sova undir føstum taki hvørja nátt, ásannandi at Føroyar ikki eru nakað tjaldingarparadís.

Krabbagággan er ókunnufólk mestsum alla aðrastaðni enn innanfyri ringvegirnar í Havn, og velur tí so ofta sum gjørligt fyriskipaðar útferðir framum at fara einsamøll til gongu.

Ferðaseðla- og útferðaprísir verða ikki íroknaðar í tær 300 krónurnar, sum krabbagággan hevur at liva fyri, men hon fer at lata orð falla, um hesir tykjast henni ov dýrir, tí eisini her roynir hon at vera sparin.

Krabbagággan hevur ongan bil, men tveir tumlar. So sært tú nakran standa í vegjaðaranum og veipa við tumlinum, kann tað væl vera okkara krabbagágga.

## Hjálp krabbagágguni

Tú kanst senda krabbagágguni uppskot og góð ráð um ferðamál og annað á teldupost adressuni:

krabbagaggan@sosialurin.fo



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Jóannes á Líðarenda, Nes, Eysturoy:

## Níggju nýggjar Fordar í 40 ár



*Jógvan Højgaard (h.m.), sølumaður hjá P/F Wenzel, handar her ein nýggjan svartan Fiesta Ambiente 1,4 við 3 hurðum til Jóannes á Líðarenda - 40 ár eftir at hann keypti sín fyrsta nýggja Ford*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Týsdagin 13. juli keypti Jóannes á Líðarenda á Nesi sín tíggjunda Ford bil síðan 1960 og sín níggjunda nýggja Ford síðan 1964**

Fyrsta Fordin keypti Jóannes í 1960, hetta var ein brúktur Ford Cortina. Í 1964 keypti hann ein nýggjan bláan Ford Corsair, sum var skrásettur sum hýruvognur við nummarplátuni Fø7.312. Sølu-maður tá var Wenzel Hammer.

Síðan keypti hann tríggjar Ford Escort í ávikavist 1972, 1976 og 1978, sum allir vóru reyðir.

Í 1986 keypti hann sín fyrsta Ford Fiesta, tann næsta í 1995, aftur ein í 2000 og so hendan nýggja svarta, sum hann keypti týsdagin, ið er tann fjórði í Fiesta- røðini hjá honum. Teir báðir fyrstu Fiesta bilarnir vóru eisini reyðir.

Bilurin sum hann keypti týsdagin var ein Ford Fiesta Ambiente við 3 hurðum og 1,4 litur bensinmotori.

Jóannes er 65 ára gamal. Hann sigldi í nógv ár sum maskinmaður. Í 1979 legðist hann upp á land og arbeiddi m.a. sum trukkførari hjá Skipafelagnum í Runavík. Í 1998 mátti hann gevast at arbeiða vegna sjúku.

Tá vit spyrja Jóannes, hvussu tað bert til, at hann hevur koyrt við sama bilmerki øll hesi árini, sigur hann, at hann altíð hevur fingið góða service, og hann hevur verið væl nøgdur við bilarnar.

Fyri 25 árum síðan:

## 10 maskinmeistarar fingu prógv í juni 1979



*28. juni 1979 fingu tíggju maskinmeistarar prógv á Føroya Maskinskúla í Havn. Teir vóru: Poul Meinhardsson Jensen, Norðragøta, Regin Sevdal, Toftir, Heri Simonsen, Vágur, Henry Christiansen, Leirvík, Atli Mortensen, Tórshavn, Petur Sivertsen, Funningur, Gordon Hofgaard Trongisvágur, Frank Tonny Østerberg, Odense, Bjarni Jensen, Hellurnar, Heðin Kyrjarheyg, Klaksvík.*

*Framman fyri næmingarnir sita lærararnir. f.v. Inger Flø Jørgensen, Magnus Simonsen, skúlastjóri, Hjørleif Hentze, Finnur Johansen, Tórarin Evensen, og Tummas Andreasen*

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1979*

## G! Festival og Gøtustevna standa saman

TÍÐINDASKRIV

Tað er nú greitt at G! Festival og Gøtustevnan verða saman um tiltøkini í Syðrugøtu um vikuskiftið. So at siga alt verður savnað á festivalløkinum inni í Syðrugøtubygd og skráin fyri bæði tiltøkini verður løgd til rættis til frama fyri heildina.

G! Festival og GÍ, sum stendur fyri Gøtustevnuni fegnast um samstarvið. "Tað týdningarmesta er at partarnir samstarva um stór tiltøk, serliga í eini lítlari bygd sum Gøtu, tí gleðast vit um eitt samstarv við G! Festival", sigur Jógvan Gregersen, formaður í GÍ, sum leggur afturat, at hann vónar og væntar at bæði Gøtustevna og G! Festival við at standa saman verða betri enn nakrantíð fyrr í ár.

"Allir partar vinna við at standa saman um tiltøkini, serliga tá so mangir gestir eru í væntu at koma til bygdina", sigur Jón Tyril, G! Festival formaður.

Samstarvið loysir upp fyri fleiri møguleikum í samband við tiltøkini bæði. Umframt at heildin gerst betri og meira innbjóðandi, er m.a. funnin ein loysn á tjaldingini. Eitt stórt tjaldingarøkið verður til taks kring fótbóltsvøllin í Norðragøtu og Ítróttarhúsið verður nýtt til WC og brúsu útbúnað. Vit vóna at vit við hesum klára at nøkta tí ótrúliga stóra eftirspurninginum á tjaldingarplássum, leggur Jón Tyril afturat.




### Dagurin

**15. juli. Súsanna.** Í apokrýfisku bókunum verður sagt frá, at Súsanna, kona Jójakims í Bábel, varð løgd undir ótrúskap, men varð bjargað av profetinum Dánjali.

Súsonnuvísa varð kvøðin í brúardansi í Føroyum. Navnið er hebráiskt og merkir *lilja*.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri pápi, verpápi og abbi okkara

**Niclas Frederik Højgaard**

doyði og varð jarðaður.

Hjartans tøkk til prest og kirkjutænarar, sangarar, berarar og øllum tykkum sum hjálptu til við jarðarferðina og ervið.

Eisini takka vit øllum tykkum, sum við kransum, blómum og við gávum til Rituvíkar kirkju vildu minnast hann.

*Familjunnar vegna*

**Dánjal Jákup og Óli Christian**